# Selt fyri yvir 1 millión



*Higartil er ein maður nevndur í hvørjari av teimum fimm skuldsetingunum, sum hava verið fyri í grundlógaravhoyringini í Føroya Rætti. Maðurin skal hava staðið fyri einari sølu, sum hevur havt eitt virði áljóðandi yvir eina millión krónur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ein 35 ára gamal maður, sum higartil er nevndur í hvørjari skuldseting í sambandi við húsarannsóknirnar hjá løgregluni í Føroyum og í Danmark, skal hava staðið fyri einari sølu og smugling av rúsevnum til Føroya við einum samlaðum virði áljóðandi yvir eina millón kr. Hann noktar seg sekan, men varð varhaldsfongslaður í fýra vikur**

NARKOTIKA
*Heri á Rógvi*

Ein 35 ára gamal maður, sum er dani, men er búsitandi í Føroyum, varð hósdagin framsettur í grundlógaravhoyring í Føroya rætti í J.C. Scrøters gøtu.

Maðurin var sjálvur ein av níggju monnum, sum vórðu handtikinir í Føroyum, og einum dana, ið varð handtikin í Danmark.

Maðurin var í grundlógaravhoyringini skuldsettur í fleiri punktum. Skuldsetingarnar snúði seg bæði um, at hann skal hava smuglað saman við tveimum øðrum, einum føroyingi og einum dana, rúsevni til Føroya við víðarisølu fyri eygað ( eitt nú hassj og kokain) . Eisini varð hann skuldsettur fyri í fleiri ár hava staðið fyri smuglan av rúsevnum til Føroya og víðarisølu í Føroyum fyri yvir eina millión krónur í virði.

Maðurin varð eisini nevndur í hvørjari av teimum fimm skuldsetingunum, sum vórðu settar fram hósdagin. Ein av hesum hevur eisini játtað seg sekan í skuldsetingunum, ið beinleiðis kann setast í samband við 35 ára gamla danan, og hesin er eisini varhaldsfongslaður. Hetta merkir, at tað er orð móti orði í tí einari skuldsetingini.

Hin danin, sum eisini varð nevndur í skuldsetingunum hjá tí 35 ára gamli, er eisini varhaldsfongslaður. Tað hevur ikki eydnast at fingið upplýst, hvørt hesin maðurin hevur játtað seg sekan ella ei.

Einki, sum verður sagt í grundlógaravhoyringini uttan sjálv skuldsetingin, verður almannakunngjørt, tí grundlógaravhoyringin var fyri afturlatnum hurðum.

Hin 35 ára gamli danin, sum sambært skuldsetingini hevur verið ein stórur partur av rúsevnissmuglingini í Føroyum, noktar seg sekan í báðum ákærunum.

Dómarin, Henrik Møller, metti, at orsøk var til at varhaldsfongsla mannin í fýra vikur. Tær báðar fyrstu vikurnar vera í isolatión. Hin 35 ára gamli skeyt ikki úrskurðin hjá dómaranum fyri landsrættin.

Tað, at talan er um sterkari evni enn hassj í størri nøgd, ger, at í einum møguligum dómi kann straffurin hugsast at gerast munandi harðari. Maðurin er ákærdur eftir straffilógini, og kann ein møgulig fongsulsrevsing merkja upp til 10 ár handan rimarnar.

Fýra av teimum níggju handtiknu vórðu leyslatnir eftir avhoyringarnar. Av teimum fimm, ið vórðu grundlógaravhoyrdir, vórðu 4 varhaldsfongslaðir, allir í fýra vikur, har tær fyrstu tvær vikurnar eru í isolatión. Ein teirra, ein 27 ára gamal maður, kærdi dómin fyri landsrættin. Úrskurðurin hjá landsrættinum kann væntast um eina viku ella so. Hesin verður grundaður á skrivligar upplýsingar frá grundlógaravhoyringini einans.

Løgreglan:

# Kanningarnar halda áfram

**– Enn er langt á mál hjá okkum, men vit halda áfram við kanningunum, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni**

NARKOTIKA
*Heri á Rógvi*

– Eg kann bert siga, at kanningararbeiðið hjá løgregluni heldur áfram, og vit hava ikki handtikið nakran afturat, segði Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni, fyri Sosialinum, tá vit ringdu til hansara fríggjamorgunin.

Hann váttar, at talan hevur verið umfatandi arbeiði hjá løgregluni. Í skuldsetingunum varð í fleiri førum nevnt eitt tíðarskeið frá juni 2001 til oktober 2001. Hesa tíðina hevur løgreglan so fylgt teimum nú skuldsettu rættiliga væl.

Løgreglan hevur áður sagt, at teir meta seg hava fingið hendur á bakmonnum, og hetta halda teir fast við.

Ovastin á kriminaldeildini vil ikki siga nakað um, hvørjar kanningar teir fara at gera ella hvar tær fara fram.

Spurdur um løgreglan nú stendur sterkari, tá ein av teimum skuldsettu hevur játtað seg sekan, sigur Bergleif Brimvík, at teir standa sterkari, men kann ikki siga nakað meira um, hvørja ávirkan hetta fær.

Maðurin, ið varð handtikin í Danmark kemur eftir ætlan til Føroya í næstum, tí málið verður viðgjørt her.

Teir fýra menninir, ið eru varhaldsfongslaðir í Føroyum, skulu allir sita tær fyrstu tvær vikurnar í isolatión ella avbyrgdir.

Bergleif Brimvík greiðir frá, at hetta merkir, at menninir verða avbyrgdir frá øðrum fangum. Tað verður ikki møguleiki hjá teimum at samskifta við aðrar fangar. Bræva- og vitjunarsamskifti verður gjølliga fylgt eisini.

Tað er eisini avmarkað til átta vikur, ið teir varhaldsfongslaðu kunnu sita avbyrgdir.



*Hósdagin hevði løgreglan úr at gera við hava eftirlit við rættarhølunum. Nú liggur eitt kanningararbeiði fyri framman.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Ingi Mohr, Heilbrigdið:

# Stórur rúsevnamarknaður í Føroyum

**Ingi Mohr leiðari fyri Heilbrigdið fegnast um átakið hjá løgregluni. Tó heldur hann, at tað er stórur tørvur á eitt nú fleiri hassjhundum, soleiðis at tak kann fáast á nógvu og eisini skipaðu smuglingini til Føroya. í Føroyum er ein stórur rúsevnamarknaður, og sterkaru evnini sum kokain og LSD hava leingi verið í Føroyum, metir Ingi**

NARKOTIKA
*Heri á Rógvi*

– Vit hava leingi kent til bæði skipaðan innfluttning og sterkari rúsevni í Føroyum. Tað eru ógvuliga væl skipaði viðurskifti á hesum økinum, og bakmenninir nýta nógv onnur at gera arbeiðið fyri seg, sigur Ingi Mohr.

Sambært Inga Mohr, hevur skipaður innflutningur verið til Føroya í nógv ár, men bakmenninir duga at nýta strámenn til at gera tað nógva arbeiðið fyri seg. Millum hesi eru eisini óskrivaðar reglur, sum bera í sær, at fólkini ikki vilja siga nakað.

Sambært Inga Mohr, hava bakmenninir í rúsevnasmuglingini vunnið sær fitt av peningi, og samlaða virðið er fleiri millóna upphædd.

Tað vakti stóran ans, tá løgreglan eftir eitt umfatandi átak við m.ø. húsarannsóknum handtók níggju menn í Føroyum og ein mann í Danmark. Fimm teirra vórðu, sum tað eisini stendur aðrastaðni í blaðnum, í grundlógaravhoyring hósdagin.

Ingi Mohr er til dagligt leiðari fyri viðgerðarstovnin Heilbrigdið, sum millum ár og dag hevur havt í túsundatali av sjúklingum m.a. rúsevnamisnýtarum í viðgerð. Hann fegnast um, at løgreglan tekur hetta stigið.

– Tað er gleðiligt, at løgreglan nú tekur hetta stigið. Vónandi hevur løgreglan eisini fingið fatur á rætta endanum. Eg haldi tó, at løgreglan skuldi fingið enn betri umstøður at arbeiða undir og fleiri pengar at arbeiða við. Eitt nú er tørvur á fleiri hassjhundum enn bert tí eina, tí hann kann bert vera á einum stað í senn, og hetta kunnu innflytararnir gera sær dælt av, sigur Ingi Mohr.

Hann heldur, løgreglan í eina tíð kundi eitt nú kannað hvørt eitt einasta viðføri, sum kom til landið, tá hetta vildi virkað munandi væl á fyribyrgingina. Eisini eiga myndugleikarnir at hava eyguni eftir teimum fremmandu, sum koma til Føroya. Samstundis vil hann eisini fegin undirstrika, at Heilbrigdið ikki leggur seg út í arbeiðið hjá løgregluni, sum eisini hevur skil fyri hesum.

Hóast fleiri nú eru handtiknir, sum sigast at eiga ein stóran part av marknaðinum í Føroyum, so roknar Ingi ikki við, at nýtslan fer at hvørva av hesari orsøk.

– Støðan er soleiðis, at tað í Føroyum í dag eru misnýtarar, sum heilt einfalt ikki kunnu liva uttan rúsevni. Marknaðurin í Føroyum er stórur, og tað er spurningurin, um tað ikki koma nýggir til, sigur Ingi Mohr.



*Støðan er soleiðis, at tað í Føroyum í dag eru misnýtarar, sum heilt einfalt ikki kunnu liva uttan rúsevni. Marknaðurin í Føroyum er stórur, og tað er spurningurin, um tað ikki koma nýggir til, sigur Ingi Mohr*

## Kenna tey sterku

Í grundlógaravhoyringunum hósdagin vórðu eisini sterkari evni enn hassj nevnd í skuldsetingunum. Bæði amfetamin og kokain vórðu nevnd. Hetta er tó ikki nakað, sum gevur óvart á Inga.

– Vit kenna hesi evnini og eisini onnur sterk evni sum eitt nú LSD. Tað hevur verið mest at sæð til hesi evnini tey seinastu 5-7 árini, sigur Ingi Mohr.

Talan er um sterk evni, sum gera stóran skaða. Ingi sigur, at "sjálvt" hassj ger ógvuliga stóran skaða, tá evnið broytir persónligheitina munandi.

# Kunnu vænta harðan straff

**Teir fimm menninir, sum eru varhaldsfongslaðir í sambandi atsókninirnar hjá løgregluni, kunnu vænta sær harðan straf, um teir verða ákærdir og funnir sekir**

NARKOTIKA
*Stefan í Skorini*
*Heri á Rógvi*

Teir fýra menninir í Føroyum og tann eini danin í Danmark kunnu vænta sær harðan straf, um ákæra verður reist móti teimum og teir verða funni sekir.

Teir eru higartil skuldsettir eftir straffilógini. Talan er størri mongdir av dusandi rúsevnum, og hetta kann væl hugsast at geva harðan straf.

Hetta verður grundað á eitt rundskriv, sum Rigsadvokaten sendi út í 1991, har umstøður líknandi teimum skuldsetingunum hjá teimum fimm monnunum kunnu metast eftir teirri harðuru revsurammuni í straffilógini.

Tilsamans vórðu níggju mans handtiknir eftir umfatandi húsarannsóknir. Átta eru búsitandi í Havn og ein í Klaksvík. Ein dani er harumframt handtikin í Keypmannahavn. Sostatt vórðu tilsamans tíggju mans handtiknir.

Ein 33 ára gamal maður er skuldsettur fyri at hava tikið ímóti 2,5 kg av rúsandi evnum, sum eru ætlað til sølu. Hetta er farið fram í tíðarskeiðnum frá august til oktober í 2001. Harumframt er hann skuldsettur fyri at hava smuglað 500 gramm av hassji tann 8. desember í fjør.

Maðurin noktar seg sekan í at hava havt 2,5 kilo av hassji við sølu fyri eygað. Hann játtar seg hinvegin sekan í at hava smuglað tey 500 grammini. Maðurin er varðhaldsfongslaður í fýra vikur, har hann er avbyrgdur í tvær vikur, og hann tók ímóti dóminum.

Ein 29 ára gamal maður er skuldsettur fyri at hava tikið ímóti ávísari nøgd av rúsandi evnum við sølu fyri eygað í tíðarskeiðnum frá juli til oktober í fjør. Í øðrum lagi er hann skuldsettur fyri at hava havt 46 gramm av hassji uppi á sær, og hesum játtaði hann seg sekan í. Hann noktaði seg hinvegin sekan í at hava selt rúsandi evni. Hesin varð leyslatin beinanvegin, tí hann ikki hevði ávirkan á kanningarnar hjá løgregluni.

Ein 27 ára gamal maður er skuldsettur fyri at hava goymt og selt hassj, amfetamin og kokain í tíðarskeiðnum frá mei til oktober í fjør. Hesin noktar seg sekan í øllum. Dómarin gav honum varðhaldsfongsling í fýra vikur, men hann hevur skotið henda dómin inn fyri Landsrættin.

Ein 29 ára gamal maður er skuldsettur fyri at hava smuglað hassj og kokain til landið við sølu fyri eygað. Hann játtaði seg sekan í hesum ákærum.

Ein maður verður nevndur í øllum ákærunum. Hann verður mettur at vera ein av høvuðsmonnunum í skipaðu smuglingini. Tað er ein 35 ára gamal dani, ið er búsitandi í Føroyum. Hann var tann seinasti, ið varð avhoyrdur í rættinum hósdagin.

Hann er skuldsettur fyri at hava smuglað og selt rúsandi evni í Føroyum ígjøgnum fleiri ár. Talan er serliga um hassj og kokain. Løgreglan vil vera við, at hann hevur skipað fyri sølu áljóðandi yvir eina millión krónur. Maðurin noktar seg sekan í øllum hesum ákærum. Hann varð varðhaldsfongslaður í fýra vikur, og í tvær vikur er hann avbyrgdur.

Ein dani hevur í sambandi við hetta málið verið til grundlógaravhoyring í Keypmannahavn. Hann varð varðhaldsfongslaður í trettan dagar.

Løgreglan væntar at gera fleiri handtøkur í sambandi við hetta stóra átakið móti narkotika í Føroyum.



*Ein av teimum skuldsettu, sum kann vænta sær harðan straf, um hann verður ákærdur og funnin sekur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*